LM-088/2023

Fylgiskjal 8.

FRÍTT VAL

5. februar 2024
Mál nr.: 23/09500-48

Hoyringsskriv viðvíkjandi uppskoti til

Løgtingslóg
um
fosturtøku
(Fosturtøkulógin)

Frítt Val takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku. Sum heild eru vit sera fegin um, at uppskotið byggir á grundsjónarmiðið um, at tað er kvinnan, sum er upp á vegin, ið er tann, sum er best før fyri at taka avgerð um abort.

Tí, abortir koma fyri; viðgongutíðir verða steðgaðar, vórðu tað fyrr og fara at verða tað um alla tíð. Lógliga og ólógliga. Hetta er ein veruleiki, sum vit ikki kunnu skúgva til viks. Sum samfelag hava vit ábyrgd av at tryggja greiðar mannagongdir, tryggar lógarkarmar og javna atgongd til abort. Verandi abortlóg frá 1956 er ógreið og kriminaliserar tey, ið taka abort eftir egnum vilja. Hetta skapar mismun og ótryggleika bæði fyri kvinnuna, ið ynskir abort, og fyri læknan, ið skal virka undir verandi lóg.

Yvirskipað sær Frítt Val jaligt uppá uppskotið til nýggja løgtingslóg um fosturtøku. Serliga taka vit undir við, at lógaruppskotið tryggjar kvinnum rættin til at taka abort eftir egnum ynski - og uttan at skulla fáa loyvi frá lækna ella øðrum - áðrenn endan av 12. viku. Tó eru eisini viðurskifti í uppskotinum, ið vit ynskja at gera vart við.

Viðmerkingar til §1

Frítt Val fegnast um, at tað í §1 verður staðfest at allar kvinnur, ið búgva í Føroyum, hava rætt til abort eftir egnum vilja fram til endan av 12. viku av viðgongutíðini. Tó vilja vit gera vart við orðingina "við barn". Her viðmæla vit, at tað í lógini verður nýtt ein meira neutral orðing, so sum "upp á vegin".[1]

[1]"Upp á vegin" stendur millum føroysku týðingarnar av bæði enska orðinum "pregnant" og danska orðinum "gravid" í orðabókunum á heimasíðuni hjá Sprotanum. Eisini vísa vit til tær

Vit mæla til at broyta orðingina "(...) og kvinnan framvegis vil hava fosturtøku eftir at hava fingið kunning og vegleiðing sambært § 7" til "(...) og kvinnan hevur fingið læknafrøðiliga kunning og vegleiðing um inntrivið sambært § 10 og kunning um tilboð um ráðgeving sambært § 7".

Harafturat vilja vit viðmæla, at kvinnur, sum eru í Føroyum í longri tíð, hóast tær ikki hava fastan bústað í Føroyum, hava sama rætt til abort sambært §1, sum kvinnur, sum búgva í Føroyum. Hetta tryggjar, at kvinnur sum eitt nú eru eina heila summarferiu í Føroyum, kunnu fáa abortviðgerð uttan at skula fara av landinum í úrtíð ella at skula bíða, til tær koma aftur til landið, har tær búgva. Hetta stuðlar undir, at abortir - eins og lógaruppskotið leggur dent á - verða framdar so skjótt sum gjørligt. Eisini tryggjar tað, at føroyingar, sum búgva uttanlands í lestrarørindum, hava rætt til abort í Føroyum.

Viðmerkingar til §7

Tað er jaligt, at tað verður skipað eitt nýtt tilboð um ráðgeving, har kvinnan hevur rætt til samrøðu(r) við viðkomandi serfrøðingar. Tað er av stórum týdningi, at ráðgevingin er valfrí og óheft.

Viðmerkingar til §8

Lógaruppskotið staðfestir, at kvinnan áðrenn endan av viku 12 í viðgongutíðini hevur rætt til at taka abort eftir egnum ynski, uttan at hetta krevur góðkenning ella loyvi. Frítt Val mælir tískil til, at orðið "umsókn" verður broytt til antin "áheitan" ella "umbøn". Hetta tí, at orðið "umsókn" av órøttum kann sipa til, at inntrivið krevur góðkenning ella loyvi.

Tað er jaligt, at kvinna sum umhugsar abort, kann venda sær til annan lækna enn egnan kommunulækna, um hon ynskir tað. Læknin, kvinnan vendir sær til, eigur at hava skyldu at geva henni tíð innan fáar dagar. Ein kommunulækni eigur ikki at kunna nokta at gera eina

---

mongu ferðirnar, sum orðingin "upp á vegin" kemur fyri í frágreiðingarlýsingunum í FØ-FØ orðabókini hjá Orðabókagrunninum:
https://sprotin.fo/dictionaries?_DictionaryId=1&_SearchInflections=0&_SearchDescriptions=1&_DictionaryPage=1&_SearchFor=%22upp%20%C3%A1%20vegin%22&_Group=

ávising til abort sambært §1. Tað eigur ikki at verða krav, at kvinnan upplýsir, hví hon ynskir abort ("serligar viðmerkingar" síða 28, regla 8).[2]

Viðmerkingar til §9

Sambært uppskotinum skal foreldramyndugleiki geva samtykki, um ein kvinna undir 18 ár ynskir at taka abort sambært §1. Ein kvinna undir 18 ár kann tó í samráð við læknan senda umsókn til samráðið um undantak til hetta kravið.

Kynsligi lógaldurin í Føroyum er 15 ár, og ung niður í 15 ár kunnu longu taka reproduktivar avgerðir sosum preventión, angribollar og at gjøgnumføra eina viðgongutíð. Ársfrágreiðingin hjá landslæknanum[3] vísir, at tað hvørt ár verða framdar abortir hjá kvinnum millum 15-19 ár. Tí eiga kvinnur niður í 15 ár eisini at verða umfataðar av rættinum til sjálvar at gera av, um tær ynskja abort, uttan ótryggleikan og bureaukratiska arbeiðið í at søkja um loyvið.

Vísandi til serligu viðmerkingarnar til §9 á síðu 29 í uppskotinum til fosturtøkulóg, kann ein abort ikki verða framd, um tann sum er upp á vegin, ikki ynskir hetta. Tað eigur somuleiðis heldur ikki at vera møguligt hjá foreldramyndugleikanum (ella makanum), at taka avgerð um at kvinna undir 18 ár skal fullføra eina viðgongutíð, um hon ikki ynskir tað. Hesin rætturin eigur at verða lógartryggjaður í einari nýggjari fosturtøkulóg. Undir ongum umstøðum eigur ein modernað lóggáva at skilja ímillum, um kvinnan undir 18 ár er gift ella ikki. Tað er ótíðarhóskandi og eigur ikki at verða avgerandi fyri, um ein kvinna kann fáa játtað ella noktað at taka abort.

---

[2] *"Vendir kvinnan sær til ein lækna, skal læknin hava eina persónliga samrøðu við kvinnuna og soleiðis fáa upplýst, hvør orsøkin til ynskið um fosturtøku er og ráðgeva og vegleiða henni"*

[3] https://landslaeknin.stps.dk/Media/638234708411439498/Heilsulýsing%20fyri%20Føroyar%202022.pdf?fbclid=IwAR0-q5yIV0lKG56o_pzGySODeK9wWyR-CjKQuKVr9c8RHR3RDcaPMzvQL3I

Frítt Val viðurkennir, at ynskiligt er, at foreldramyndugleikin er við í tilgongdini, tá ein kvinna ímillum 15-18 ár tekur avgerð um at enda eina viðgongutíð. Um læknin metir tað vera hóskandi, eigur læknin tískil at mæla kvinnuni til at tosa við foreldur/verja ella annan kendan vaksnan, áðrenn hon tekur endaliga avgerð um abort. Í førum har kvinnan ikki ynskir hetta, eigur hon, umframt vanliga tilboðið um stuðulssamrøður, at fáa í boði serligan stuðul frá viðkomandi fakpersóni. Tað kann t.d vera ein sosialráðgevi, ið eisini kann koma við til læknaviðtalur/viðgerð.

Viðmerkingar til §10 - Vegleiðing og kunning

Frítt Val tekur undir við, at læknin, kvinnan vendir sær til, skal kunna kvinnuna um inntrivið. Vit mæla til, at serlæknar í kvinnusjúkum fáa til uppgávu at definera, hvørja kunning kvinnan skal fáa. Hetta fyri at tryggja, at kunningin er óheft av sjónarmiðum hjá einkulta læknanum.

Harafturat vil Frítt Val undirstrika týdningin av, at kommunulæknin einans hevur til uppgávu at kunna kvinnuna um *møguleikan* fyri ráðgeving.

Viðmerkingar til §3, §14 og §15 - samráð og treytir

Frítt Val er av tí fatan, at tað er kvinnan sjálv, ið eigur at taka avgerð um at enda ein graviditet - eisini eftir viku 12. Hetta sjónarmiðið byggir á eitt grundleggjandi álit á, at kvinnan er best før fyri sjálv at taka avgerðir um egna reproduktión. Vit halda tí ikki, at avgerð eigur at verða tikin um hetta av einum samráði.

Stendur samráðið við, vilja vit heita á landsstýrið um at gera broytingar í §3, 14 og 15.

Viðmerkingar til §3

Uppskotið loyvir abort eftir viku 12 sambært treytunum í §3 stk. 1-5. Sum heild fegnast Frítt Val um, at krøvini til loyvi at fáa abort eftir viku 12 fevna breitt.

Lesa vit serligu viðmerkingarnar á síðu 24 til §3 stk. 1. nr 2., stendur: *"Er samráðið í iva um, hvørt talan veruliga er um neyðtøku ella líknandi støðu, sum er fevnd av ásetingini, kann*

samráðið tó krevja, at málið er meldað til løgregluna, og at málið ikki er avvíst, tí tað hevur verið ógrundað". Frítt Val tekur ikki undir við, at samráðið kann krevja, at revsimál eru meldað til løgregluna.

Lesa vit serligu viðmerkingarnar longri niðri á síðu 24 til §3 stk. 1, nr. 3., so stendur: *"Loyvi kann verða givið til fosturtøku av sonevndum eugeniskum (ættarrøktarligum) orsøkum. Tað er um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku.".*

Ynski um abort skal taka útgangsstøði í avgerðini hjá einkultu kvinnuni og ikki samfelagnum - vit mæla til at orðið eugenikkur verður strikað: *"Loyvi kann verða givið til fosturtøku um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku.".*

Viðmerkingar til §14

Tað er umráðandi at samráðið, ið tekur avgerð um at loyva abort eftir viku 12, er politiskt óheft og ikki kann verða ávirkað av politiskum seráhugamálum. Tí tekur Frítt Val ikki undir við ásetingini í §14 um, at tað er landsstýrisfólkið, ið setur samráðið. Vit mæla til at t.d Heilsustýrið ella Heilsutrygd setur samráðið. Samráðið eigur ikki at vera ávirkað av, hvørjir flokkar sita í stjórn.

Føroyska samfelagið er somikið lítið, at tað lættliga kann henda, at persónurin, sum ynskir abort, hevur eitt persónligt samband við ein samráðslim. Tí er týdningarmikið at greiðar reglur eru um ógegni í samráðnum, og at varalimir verða tilnevndir.

Frítt Val metir ikki, at tað er nóg greitt sambært serligu viðmerkingunum til §14, hvussu samráðslimurin við løgfrøðiligari ella sosialari útbúgving verður valdur. Tað eigur at vera greitt nærri frá, hvørjir førleikar gera, at persónurin við løgfrøðiligari ella sosialari útbúgving er egnað/ur til at taka avgerðir um nøring hjá kvinnum eftir viku 12. 'Sosial útbúgving' er eitt breitt heiti fyri fleiri útbúgvingar og fakgreinar. Er talan um ein sosialráðgeva, eigur tað at vera staðfest.

Løgfrøðingar og sosialráðgevar hava sera ymiskar útbúgvingar og fakligar førleikar, so tískil meta vit tað vera ørkymlandi, at *ein* persónur frá hesum báðum fakbólkum verður valdur at umboða samráðið.

Í serligu viðmerkingunum til §14 er greinað, hvørjar uppgávurnar hjá løgfrøðinginum eru, og at løgfrøðingurin m.a skal: "*...tryggja at málsviðgerðin fer rætt fram, og at ásetingarnar í dátuverndarlógini verða hildnar.*" Frítt Val spyr tí, hvør skal tryggja hesum, um løgfrøðingur ikki er partur av samráðnum.

Viðmerkingar til §15

At taka avgerð um, hvørt ein abort kann verða framd ella ikki, er ein avgerð, ið ávirkar lívið hjá persóninum, ið er upp á vegin. Tískil er Frítt Val ikki samd við kravinum í §15 um, at tað skal vera semja í ráðnum. Vit mæla til, at vanligur meiriluti er galdandi, tá avgerð verður tikin í samráðnum.

Vit vilja enn einaferð takka fyri møguleikan at koma við viðmerkingum og takka fyri at málið verður tikið upp.

Vinarliga,
Nevndin í Fríum Vali

Um Frítt Val

Frítt Val er rørsla teirra, ið stríðast fyri rættinum til at velja abort í Føroyum - í tryggum, fordómsfríum og lógligum umstøðum. Hetta sjónarmiðið byggir á eitt grundleggjandi álit á, at tann, sum er uppá vegin, er før fyri sjálv at taka avgerðir um egna reproduktión.